## B71-SÍ 6-3 (2-2)

0-1: Jóhan Petur á Stongum 9.
1-1: Wellingtong Soares 25.
1-2: Marcello Marcelino 40.
2-2: Magnus Olsen 41.
3-2: Rasmus Nielsen 55.
4-2: Clayton Soares 57.
5-2: Magnus Olsen 60.
5-3: Sjálvmál 61.
6-3: Magnus Olsen 70.

## KÍ-VB/Sumba 1-0 (1-0)

1-0: Erling Fles 9.

## TB-FS Vágar2004 0-1 (0-0)

0-1: Gisli Sveinbjørnsson 81.

## HB-AB 2-4 (1-2)

1-0: Allan Mørkøre 12.
2-0: Dion Jacobsen 17.
2-1: Poul Tummas Dam br. 39.
3-1: Eyðstein Jacobsen 49.
4-1: Dion Jacobsen 70.
4-2 Hendrik Rubeksen 82.

## LÍF-Royn 5-0 (2-0)

1-0: Magnus Skoralíð
2-0: Andreas Lava Olsen
3-0: Magnus Skoralíð
4-0: Áslakur Jacobsen
5-0: Marius Nystrøm Hansen



*Clayton Soares skýtur framvegis mál við fullari ferð. Higartil eru átta mál komin frá honum í fyrstu seks umførunum*

vónirnar. Stóri týdningurin av møguleikanum ikki at fáa stig darvaði samanspælinum, sum tað gekk illa at fáa at hanga saman.

Báðir partar høvdu málmøguleikar, men tað tóktist leingi skula endað málleyst. Einasta málið fekk FSV04, tá ið tað vóru níggju minuttir eftir. Málskjútti var Gisli Sveinbjørnsson, eftir at Karl Jóhan Djurhuus hevði lagt innfyri úr høgru. Frammanundan hevði Birgir Joensen stutt eftir at hann í 2. hálvleiki var komin á vøllin rættuliga stóran møguleika, men eftir innlegg úr høgru sendi hann uppum málið.

Síðstu løtuna trýsti TB rættuliga nógv. Teir fingu fleiri hornaspørk. Í teimum støðunum eru teir altíð vandamiklir, men FSV04 helt tætt. Allan Poulsen fekk møguleika í brotsteiginum, men hann rakti ikki nóg væl.

Í yvirtíðini fekk innskifti Mortan Joensen langa sending, á veg móti TB málinum togaði Kim Roest ov nógv í vágamannin. Tað kostaði seinna gula kortið og harvið ostaskorpuna.

### HB-AB 2-4

Argjamenn plaga at hava tað torført í Gundadali. Hesa ferð gekk væl, og tað boðar ivaleyst frá nýggjum fótbóltstíðum á Argjum.

Enn dúva teir nógv upp á fremmanda arbeiðarar, um tað er loyvt at taka soleiðis til. Allan Mørkøre skoraði fyrsta málið eitt sindur úr høgru, og veteranurin, sum hesa ferð var ytstur á miðvøllinum í høgru, átti sín lut í øllum AB málunum.

Løtu eftir fyrsta málið átti hann innleggið til málið, sum ungi argjamaðurin Dion Jacobsen skoraði. Undan steðginum minkaði Poul Tummas Dam um munin. Ungi maðurin, sum var miðvallari hesa ferð, umsetti brotsspark, ið var dømt eftir hornaspark.

Stutt eftir steðgin økti Eyðstein Jacobsen um munin til 3-1 eftir innlegg frá Allani Mørkøre, og Dion Jacobsen stútaði AB framum 4-1, eftir somu uppskrift. Hendrik Rubeksen er komin fyri seg aftur eftir langan skaðasteðg. Hann pyntaði um til 4-2 við beinleiðis frísparki.

### LÍF-Royn 5-0

Tað var ongantíð ivi um, hvat stigini fóru. Spurningurin var heldur, hvussu stórur heimasigurin skuldi gerast í øllum tunnilsróminum.

Royn hevði ikki nógv at bjóða uppá. Hugburðurin hjá teimum var, at tapið skuldi verða minni, enn tað var í fjør, tá ið teir taptu við tvísifraðum tali.

LÍF vann 5-0, og teir høvdu møguleikar til meiri enn tvífalt so stóran sigur. Magnus Skoralíð, sum tykist vera heilt væl fyri, setti hol á, og undan steðginum økti ein annar av evnaríku leirvíkingunum. Andreas Lava Olsen spældi eitt tvey við Hans Fróða Hansen, sum tóktist vera smáskaddur og hevði sett seg sjálvan í álopið ta løtuna, hann var á vøllinum.

Eftir steðgin økti Magnus Skoralíð til 3-0, og hann átti frísparksinnleggið, sum Áslakur Jacobsen við høvdinum sendi í hvalbiar málið. Síðsta málið skoraði Marius Nystrøm Hansen, sum var komin á vøllin fyri Hans Fróða Hansen.

Pf. Svend Krosstein



P/F Svend Krosstein heilsøla var stovnað í 1966. Vit bjóða heildarloysnir innan kloak, vatn, hitaverk, ventilatión, sanitet og baðirúmsmøblar. Eisini selja vit nakað av veiðureiðskapi. Í løtuni arbeiða 18 fólk á virkinum

LÆRLINGUR TIL HANDILIN

Vegna økt virksemi søkja vit eftir dugnaligum lærlingi til handil okkara.

**Starvið**
Tú kemur at arbeiða innan øll økir í innkeyps- og søluliðinum í fyritøkuni, so sum avgreiðslu og vegleiðing av kundum og útrokning av tilboðum.

**Lærutíðin**
Er 3 ár um umsøkjarin hevur FHS, 2 ár 18 vikur við HIF og 2 ár um umsøkjarin hevur HH.

**Afturfyri bjóða vit tær**
· Eitt spennandi læurupláss við nógvum møguleikum
· Góðar samstarvsfelagar í góðum fakligum arbeiðsumhvørvi
· Løn samb. S&K
· Stutt sagt, eitt spennandi starv í eini fyritøku í støðugari menning

**Umsóknarfreistin**
Næmingar, sum verða lidnir í juni, kunnu eisini søkja. Umsóknarfreistin er 15. maj 2006 og skulu umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum sendast til:

Falkavegur 6 · FO-110 Tórshavn
Tel. 34 46 00 · Fax. 34 46 01
E-mail: krosstein@krosstein.fo

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tlf. 34 46 00 og tosa við Anniku Krosstein, stjóra.

Sosialurin 341800

Pf. Svend Krosstein



P/F Svend Krosstein heilsøla var stovnað í 1966. Vit bjóða heildarloysnir innan kloak, vatn, hitaverk, ventilatión, sanitet og baðirúmsmøblar. Eisini selja vit nakað av veiðureiðskapi. Í løtuni arbeiða 18 fólk á virkinum

SØLUFÓLK TIL HANDILIN

Vegna økt virksemi søkja vit eftir dugnaligum sølufólki til handil okkara at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Inniber, at tú fyrst og fremst skal virka innan sølu og tænastu mótvegis kundum okkara. Samstundis verður innkeyp og samskifti við veitarar av vørum til handilin ein partur av arbeiðsdegnum.

**Tað hevur fyrimunir um tú hevur**
· Viðkomandi útbúgving og/ella drúgvar royndir
· Kunnleika til Navision Financials
· Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
· Ert fyrikomandi, nærlagdur, íðin og kreativur

**Afturfyri bjóða vit tær**
· Eitt spennandi arbeiði við nógvum møguleikum
· Góðar samstarvsfelagar í góðum fakligum arbeiðsumhvørvi
· Ávirkan á tín egna arbeiðsdag
· Løn í samsvar við tín førleika
· Stutt sagt, eitt spennandi starv í eini fyritøku í støðugari menning

**Umsóknarfreistin**
Er 15. maj 2006 og skulu umsóknirnar sendast til:

Falkavegur 6 · FO-110 Tórshavn
Tel. 34 46 00 · Fax. 34 46 01
E-mail: krosstein@krosstein.fo

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tlf. 34 46 00 og tosa við Anniku Krosstein, stjóra.

Sosialurin 341800